FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

## Starv sum bókavørður á Fuglafjarðar Bókasavni

Starvið sum bókavørður á Fuglafjarðar Bókasavni verður hervið lýst leyst til setan tann 01. mars 2010 ella skjótast eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur í starvinum at hava leiðsluna av Bókasavninum, har tú kemur at arbeiða við øllum vanligum bókavarðaarbeiði í tøttum samstarvi við Kunningarstovuna í Fuglafirði, sum heldur til í somu húsum sum bókasavnið.

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst útbúgving sum bókavørður, men um so verður, at eingin umsøkjari er til starvið við hesi útbúgving, so kann annar umsøkjari verða settur í 1 ára tíðaravmarkað starv. Tú skal hava viðkomandi førleika í enskum máli í talu og skrift, somuleiðis sum tú skal duga væl at orða teg bæði munnliga og skrivliga, hava teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðsluamboð.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú fært møguleika fyri at menna bókasavnið.

**Setanartreytir:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Hevur tú áhuga**
so ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi mánadaginn tann 08. februar 2010 kl. 16.00.

**Nærri upplýsningar**
fáast við at venda sær til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737700.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 20. januar 2010*

**Fuglafjarðar býráð**




## SKRIVARI TIL Hvalbiar kommunu

Hvalbiar kommuna søkir eftir skrivara at byrja sum skjótast. Talan er um eitt fulltíðarstarv.

**Starvið**
Tann, ið settur verður, skal m.a. taka sær av
- øllum vanligum uppgávum hjá kommununi
- luttaka á bygdaráðsfundum
- postavgreiðslu og
- journalisering

**Umsøkjarin**
Umsøkjarin skal
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- hava góð samstarvsevni
- hava telduførleika
- hava kunnleika til fíggjarstýring og fyrisitingarrætt

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til Advokatvirkið Postsmoga 85, 110 Tórshavn

Umsóknin skal verða undirritaða í hendi í seinasta lagi 01.02.2010 Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hans Trygva Teirin, adv. tlf. 225045.

**Advokatvirkið**
Páll Nielsen
Sigmund Poulsen
Eyðhild Skaalum
Hans Trygvi Teirin

Skansavegur 1
Postsmoga 85
110 Tórshavn
Tlf. 31 21 71
fax 31 58 74
pall@advokatvirkid.fo

AGAPE

## Frá Felagnum Agape.fo

**Viðv. aðalfundi og fyrilestri við Ole Rabjerg aut.cand.psyk.**

Aðalfundur felagsins verður í kirkjukjallaranum í Christianskirkjuni í Klaksvík, fríggjakvøldið 12. februar kl. 18:00

Uppskot um eykalim til nevndina skal sendast við telduposti til agape@agape.fo í seinasta lagi 29. januar.

Skrá smb. viðtøkurnar, sí www.agape.fo

Eftir aðalfundin verður ein máltíð.

**Kl. 20:00 heldur Ole Rabjerg psykologur ein fyrilestur við heitinum: »tann neyðuga eginumsorganin«.**

Tað er ókeypis at luttaka.

ØLL eru hjartaliga vælkomin, bæði til aðalfundin og til fyrilesturin, tað er ikki neyðugt at verða limur í felagnum, fyri at verða við.

Nevndin í Agape.fo

Rigsombudsmanden på Færøerne

## DANSK-FÆRØSK KULTURFOND

Opmærksomheden henledes på, at fristen for indsendelse af ansøgninger til Dansk-Færøsk Kulturfond er fastsat til den **1. marts 2010.**

Der kan gives støtte til formål indenfor teater, film, musik og kunst, bogudgivelser, visse studierejser m.m. Der gives normalt ikke støtte til nordiske konferencer, skolerejser og lign. samt egentlige uddannelsesformål.

Dansk-Færøsk Kulturfond bestyrer også »Dansk-Færøsk Samfunds studierejselegat«. Legatet består af to portioner på 10.000,- kr. Den ene portion til en studierejse til Danmark for personer mellem 18 og 30 år. Studierejsen skal have et formål, der falder inden for Dansk-Færøsk Kulturfonds formål.

Ansøgninger skal sendes til fondens sekretær, afdelingsleder Lenna Hansen, Statsministeriet, Prins Jørgens Gård 11, DK-1218 København K.

Yderligere oplysninger om Dansk-Færøsk Kulturfond kan fås ved henvendelse til sekretæren, tlf. 0045 33 92 22 09, eller til Rigsombudet, tlf. 35 12 00.

POSTBOKS 12 | FO-110 TÓRSHAVN | TEL. 35 12 00
RIOMFR@FO.STM.DK | WWW.RIGSOMBUDSMANDEN.FO

## Leiðari til kafeteria/kiosk

Fótbóltsfelagið B36 sóknast eftir fólki at reka kiosk og kafeteria í B36-húsinum eins og at umsita útleigu av hølunum.

B36 er eitt tað størsta ítróttarfelagið í landinum. Stórur partur av limunum, bæði ung og eldri, hava sína dagligu gongd í húsinum.

B36-húsið er væl egnað til veitslur, fundir, skeiðsvirksemi o.a.

Tað er pláss fyri uml. 250 fólkum í B36 húsinum.

Køksumstøðurnar eru góðar.

Tann, ið rekur kioskina og kafeteria, arbeiðir eftir einari samstarvsavtalu við starvsnevndina hjá B36, men hevur tó egnan roknskap, mvg v.m.

Umsóknarfreistin er 4. februar 2010

**Eru spurningar ring ella maila til:**

*Bárður Simonsen*
*Tel 231920*
*bs@sveisingahandilin.fo*

FÓTBÓLTSFELAGIÐ B36 F.C. TÓRSHAVN